Eysturskúlin

Skrivlig roynd 2023

8.flokkur

<u>Góðu næmingar og foreldur í 8.flokki</u>

Frá 7.mars til og við 10.mars 2023 skulu næmingarnir í 8. flokki til skrivliga roynd í føroyskari framseting/stíli og máluppgávu, danskari framseting/stíli og máluppgávu, enskari framseting/stíli og máluppgávu umframt fimis- og greiðslurokning.

Skrivligu royndirnar eru hesar dagar:

Várroynd		**8.flokkur**	
Danskt 7.mars		08:15 – 9.45 máluppgáva 9:45 – 10:15 Steðgur 10:15 – 13:45 framseting	
Enskt 8.mars		08:15 - 9:45 Máluppgáva 9:45 – 10:15 Steðgur 10:15 – 13:15 Framseting	
Støddfrøði 9.mars		08:15 - 9:15 fimisrokning 9:15 – 09:45 Steðgur 09:45 – 13:45 greiðslurokning	
Føroyskt 10.mars		08:15 - 09:45 máluppgáva 09:45 – 10:15 Steðgur 10:15 – 13:45 Framseting	

Næmingarnir skulu sita klárir í royndarhølinum, skúlahøllini, **fimtan minuttir** áðrenn royndin byrjar.
Næmingarnir hava frí, tá ið teir eru lidnir við síni avrik.

Um so er, at næmingur møtir ov seint, skal næmingurin møta á skrivstovuni.
Um næmingur ikki møtir, hevur fríloyvi ella er sjúkur, skal skrivstovan ella flokslærari hava boð frá foreldrunum.

Blíðar heilsanir

Eysturskúlin

Eyðna Magnussen, skúlastjóri

Stutt kunning um royndirnar til næmingar og foreldur

- Fimisrokningin er talgild, men greiðslurokningin verður skrivað á pappír.
- Tá næmingurin er liðugur við fimisrokningina, verður hon latin inn.

- Síðani verður ein steðgur, og eftir tað byrjar greiðslurokningin.
- Ein tími er settur av til fimisrokning og 4 tímar til greiðslurokning.

Fimisrokning:

Her verður dentur lagdur á høvuðrokning. Roknimaskina er **ikki** loyvd, men annars eru vanligir hjálpimiðlar loyvdir, eitt nú gamlar uppgávur og "Støddfrøði – handbókin". Best er, um næmingurin hevur sína egnu Støddfrøði-handbók við.
Fimisrokningin er talgild, men næmingarnir gera útrokningar á pappírskladdu, sum teir fáa frá skúlanum.

Amboð, ið næmingar skulu hava við til royndina í fimisrokning, eru:

- Blýantur
- Viskileður
- Passari
- Vinkulmátari
- Tríkantur
- Støddfrøði handbók

Greiðslurokning:

Her verður dentur lagdur á tað, ið eisini verður nevnt "problemrokning". Her má næmingurin í størri mun skilja uppgávuna, finna upplýsingar til spurningarnar og loysa teir. Loysnin kann ikki standa einsamøll, men ein frágreiðing má vera, ið vísir, hvussu næmingurin er komin fram til loysnina. Í greiðslurokning roknar næmingurin fyrst á kladdu, síðani verða uppgávurnar førdar inn við penni. Tekningar kunnu tó gerast við blýanti. Teldan er hjáparamboð og til ber at fara á netið.

Amboð at hava við til royndina í greiðslurokning eru:

- Blýantur
- **Pennur – at føra inn við**
- viskileður
- Linjál
- Passari
- Vinkulmátari
- Tríkantur
- Einglablóð (rættilakk)
- Roknimaskina
- "Støddfrøði – handbók"
-

- **Føroyskt:** -*Royndin í føroyskum er talgild.*

- **Hvør næmingur hevur oyrnatelefon (ikki bluetooth) við.**
- Fimm tímar eru tilsamans settir av til máluppgávu og framseting.

- Hálvur annar tími er settur av til fyrisøgn, máluppgávu og lesifatan – ein hálvur tími til hvørja uppgávu. Eftir ein steðg verður farið undir framseting.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur á www.sprotin.fo og annars alt annað tilfar, ið hann kann hugsað sær.

- **Danskt:** *-Royndin í donskum er talgild.*

- **Hvør næmingur hevur oyratelefon við.**
- Fimm tímar eru tilsamans settir av til máluppgávu og framseting.
- Hálvur annar tími er settur av til fyrisøgn, máluppgávu og lesifatan – ein hálvur tími til hvørja uppgávu. Eftir ein steðg verður farið undir framseting.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur á www.sprotin.fo og annars allar aðrar hjálpimiðlar.

- **Enskt:** *-Royndin í enskum er talgild.*

- **Hvør næmingur hevur oyratelefon við.**
- Fýra og ein hálvur tími eru tilsamans settir av til máluppgávu og framseting.
- Hálvur annar tími er settur av til fyrisøgn, máluppgávu og lesifatan – ein hálvur tími til hvørja uppgávu. Eftir ein steðg verður farið undir framseting.
- Tá ið máluppgávan er loyst, verður ein steðgur og síðani verður farið til framseting.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur á www.sprotin.fo og annars allar aðrar hjálpimiðlar.

Reglugerð í royndarhølinum

- Í royndarhølinum er friður!
- Næmingarnir sita á sínum plássi, tá ið royndin letur upp. Tey skulu møta í góðari tíð.
- Hevur næmingur nakran spurning (WC, einglablóð,…) skal hann rætta hondina upp, bíða til vaktin kemur til hansara og lýða boðini hjá vaktini. Hetta er eisini galdandi, um hann skal bera ting aftur til floksfelagar.

Telefonir:

Telefonir eru ikki loyvdar í royndarhølinum. Næmingarnir kunnu lata telefonina liggja heima við hús ella leggja telefonirnar í ein telefonkassa, áðrenn royndin byrjar.
Telefonkassin verður í varveitslu á skrivstovu skúlans, til næmingurin er liðugur fyri dagin.
Næmingarnir heinta telefonina á skrivstovuni, áðrenn teir fara til hús.